# Valdi at liva í ljósinum



**Eini 100 fólk vóru komin saman í bygninginum hjá Føroya Tele hóskvøldið at hoyra svenska sløkkiliðsmannin, Lassa Gustavsson, greiða frá um sítt lív. Eitt lív, ið er sera nógv merkt av eini arbeiðsvanlukku fyri 24 árum síðani**

FYRILESTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bæði hjá pedagogum, lærarum og fyrilestrarhaldarum er tað ofta ein lyklaspurningur, hvussu man fangar áhoyrararnar, tá ið man stillar seg upp at halda ein fyrilestur ella greiða frá onkrum. Soleiðis er tó ikki hjá Lassa Gustavsson. Herviliga vanlukkan í 1981, tá ið tjúgu tons av propangassi gjørdust til eld, hevur sett síni sjónligu tekin á svian, og óansæð um vit vilja góðtaka tað ella ikki, so kunnu vit ikki lata verða við at hyggja at einum manni, sum er so nógv skaddur av eldi. Lasse slapp tó betur frá vanlukkuni enn ein starvsfelagi hansara, ið lat lív.

## Nógv eftirspurdur

Tað er Klaksvíksprestur, Hans Eiler Hammer, ið hevur fingið Lassa Gustavsson til Føroya. Hans Eiler var á skúla í Noreg, og har hoyrdi hann um svian. Hann setti seg í samband við Lassa Gustavsson, og í samstarvi við ymiskar sponsorar bar so til at fáa nógv umbidna fyrilestrarhaldaran hendanvegin.

At áhugin fyri at hoyra Lassa Gustavsson greiða frá, hvussu hann kom víðari í lívinum hjá sær eftir vanlukkuna, er stórur, er sjón fyri søgn. Sambært Hans Eiler Hammer vóru ikki færri enn 20.000 norðmenn til fyrilestur hjá svianum í fjør.

Lasse Gustavsson hevði fyrilestur í Ósaskúlanum í Klaksvík mikukvøldið, og tá vóru ikki færri enn 175 fólk og lýddu á, og hóskvøldið vóru tey gott 100 í tali í Havn.

## Nógv krógva seg

Lasse Gustavsson er upprunaliga útbúgvin innan evnafrøði, men eftir at hann av tilvild var fyrstur á staðnum í sambandi við eina ferðsluvanlukku í heimbýnum Gøteborg, gjørdist honum greitt, at tað rætta hjá honum var at arbeiða við bráðfeingishjálp og menniskjum.

- Ein bilur bleiv árendur, og ein ung kvinna sat føst í bilinum. Eg fór beinan vegin til hana, og tá hoyrdi eg eisini eitt heilt lítið barn stórgræta á baksetrinum. Sum gamal skóti dugdi eg fyrstuhjálp, og eg fekk bæði kvinnuna og barnið úr bilinum, og tey komu væl frá óhappinum. Eftir at tey vóru farin avstað í sjúkrabili, kendi eg meg mestsum í einum rúsi, og tá visti eg, hvørja leið eg skuldi ganga, greiddi Lasse Gustavsson frá á fyrilestrinum.

Í Gøteborg var bygnaðurin í tá tann, at fólk arbeiddu bæði sum sløkkiliðsfólk og portørar samstundis, og Lasse søkti inn á hesa útbúgving. Hann slapp inn og fór at arbeiða, men hann hevði ikki verið í yrkinum leingi, tá ið vanlukkan hendi.

Lasse Gustavsson, sum var einans 24 ára gamal, tá ið hann bleiv brendur, lá á sjúkrahúsi í umleið eitt hálvt ár, men við góðari hjálp frá vinum og familjum kom hann fyri seg og valdi at liva víðari í ljósinum.

- Tá eg sigi, at eg valdi at liva víðari í ljósinum, so meini eg við, at tað eru nógv, sum eru í somu støðu sum eg og hava sjónlig tekin eftir eldsskaða, ið av tí sama krógva seg og koma lítið út millum fólk. Tað vil eg ikki, og sjálvt um eg veit, at fólk hyggja nógv eftir mær, so hugsi eg ikki um tað sjálvur longur, segði Lasse Gustavsson.

Vanlukkan og sjúkralegan eftir hana gav Lassa góðar stundir at hugsa um tilveruna og meiningina við lívinum, og tað eru nakrar av hesum royndum, ið hann nú fortelur fólki frá í sambandi við fyrilestrar sínar.


Vegna vaksandi virksemi og víðkað virkisøki søkja vit eftir

**Verkfrøðingi/byggifrøðingi**

Í samstarvi við leiðsluna og onnur í fyrisitingini fevnir starvið í høvuðsheitum um:

- Tilboðsrokning
- Fyrireiking av byggimálum
- Projektleiðsla
- Avseting og uppmáting

Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, sum geva góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum toymi av teknikarum og formonnum.

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði og/ella byggitøkni, og helst nakað av royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Góður kunnleiki til edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar til tílík arbeiðir, er ein treyt.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu partanna millum.

Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

P/F Articon
Postboks 3109
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. oktobur 2005.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jón Danielsen, tel. 350 700 ella 210 683.

Articon-samtakið, sum eisini fevnir um Byggi-Service, er ein byggifyritøka í støðugari menning. Feløgini takast við alt slag av byggi- og annlegsarbeiðum - bæði størri og smærri. Somuleiðis gera vit eisini alt slag av apteringsarbeiðum umborð á bátum og skipum. Tað starvast í dag umleið 80 fólk hjá feløgunum báðum, býtt millum arbeiðsfólk, handverkarar, maskin- og lastvognsførarar, formenn, byggi- og verkfrøðingar og skrivstovufólk.

Falkavegur 4, Postsmoga 3109, FO-110 Tórshavn
Tel 350 700, Faks 350 705, articon@articon.fo

ARTICON



Vit søkja:

**Netumsitara**

fá nærri at vita á
www.farodane.fo

FARODANE

Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311414 - farodane@farodane.fo